# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Tað er snøgt sagt ikki gott nokk. HB er kent fyri at spæla álopsfótbólt, og tað haldi eg manglar í løtuni*
*Christian Høgni Jacobsen*

# EM-landsliðið til reiðar



*Føroyska kvinnulandsliðið, sum nú skal royna seg í EM-undankappingini: Aftast frá vinstru: Birgit Guttesen, SÍ, Sólgerð Henriksen, Dráttur, Helen á Lakjuni Jacobsen, ÍF, Helga Guttesen, SÍ, Anna Maria M. Kruse, ÍF, Sólva Dimon, TB, Birita Joensen, KÍF. Fremst frá vinstru: Ruth Thomassen, Dráttur, Kate Kalsø, Mjølnir, Margit G. Joensen, Mjølnir, Annika á Stongum, SÍ, Karin Mikkelsen, SÍ.*

**Føroyameistararnir úr SÍ eiga flestu spælararnar á liðnum, sum um góða viku skal spæla EM-undankapping á heimavølli**

**FLOGBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Føroyska kvinnulandsliðið í flogbólti skal í næstum undir EM-undankappingardystir sínar. Seinastu vikurnar hava nógvar venjingar verið á skránni, og nú er greitt, hvørjar tær 12 eru, sum skulu umboða Føroyar.

Niklas Joensen og Magnus Tausen, vnejarar, hava úttikið Anna Maria M. Kruse, ÍF, Annika á Stongum, SÍ, Birgit Guttesen, SÍ, Birita Joensen, KÍF, Helen á Lakjuni Jacobsen, ÍF, Helga Guttesen, SÍ, Karin Mikkelsen, SÍ, Kate Kalsø, Mjølnir, Margit G. Joensen, Mjølnir, Ruth Thomassen, Dráttur, Sólgerð Henriksen, Dráttur, Sólva Dimon, TB

Sostatt er SÍ tað felagið sum er best umboða á landsliðnum við 4 leikarum, meðan ÍF, Dráttur og Mjølnir hava hvør sínar 2 leikarar við. KÍF og TB hava hvør sín.

Landsliðið hevur sínar seinastu venjingar komandi vikuskifti í Havn, áðrenn liðið flytur inn á Hotel Føroyar hósdagin í komandi viku, tá Írland, Luxembourg, Liktenstein og Skotland koma til landið við Atlantic Airways.

Tey bæði fremstu liðini í undankappingini koma víðari til eitt endaumfar, sum verður spælt í Luxermburg komandi ár.

**Dystarskrá:**
**Fríggjadagur 16. mai 2008:**
12.00 Skotland – Luxembourg
15.30 Írland – Liktenstein
18.15 Føroyar – Skotland

**Leygardagur 17. mai 2008:**
10.00 Írland – Føroyar
13.30 Liktenstein – Luxembourg
16.30 Skotland – Írland
19.30 Føroyar – Liktensten

**Sunnudagur 18. Mai 2008:**
13.30 Luxembourg – Írland
16.00 Liktenstein – Skotland
19.30 Luxembourg - Føroyar




*Sosialurin mannar Formula-liðið við teimum spælarunum, sum stóðu seg best í 6. umfarinum av Formula-deildini*

## Todi skal hava nýggjan venjara

Mánadagin var greitt, at Fremad Amager hevur steðgað samstarvinum við Jakob Friis Hansen.

Jakob Friis Hansen gjørdist venjari undan hesum kappingarárinum, og fyri vetrarsteðgin gekk rættiliga væl hjá honum og Fremad Amager.

Eftir steðgin hevur tó gingið illa í hond. Fremad Amager hevur mist annars trygga oddasessin, og eftir 3-0 tapið móti Roskilde um vikuskiftið verður sera trupult at vinna seg aftur á oddasessin, sum ber beinleiðis uppflyting við sær.

Ítróttarligu avrikin førdu at enda við sær, at leiðslan í felagnum ikki sá sær annan veg enn at siga venjaranum úr starvi.

- Enn hava vit ikki nakran avloysara í kikaranum, og fyribils eru Michael Madsen og føroyski Julian Hansen, sum taka sær av liðnum, sigur Todi Jónsson, nevndarformaður og stjóri í Fremad Amager. Todi vil ikki gera aðrar viðmerkingar til málið.

## Hattrick í hattrickum

ÍF Føroyar spældi í gjárkvøldið móti Kulpa, sum liðið hjá juralesandi á Keypmannahavnar Universiteti. Dysturin endaði við sannførandi 6-0 sigri til føroysku útisetarnar, sum nú veruliga mugu sigast at hava fingið gongd á, eftir at teir taptu teir báðar fyrstu dystirnar í kappingini. Og sigast má eisini, at Erling Fles av sonnum hevur fingið gongd á málskjótingina. Í gjárkvøldið skeyt hann fýra mál, og hetta er triðji dysturin á rað, at áleyparin úr Klaksvík skorar hattrick. Hini bæði málini gjørdi ein annar vandamikil harri, nevniliga Henry Petersen úr Fuglafirði. Næsti dysturin hjá ÍF Føroyum verður ikki fyrr enn 17. mai, tá mótstøðuliðið eitur BK Fix.